UTTAN ÚR HEIMI

## Kunnu vænta hægri rentu

Mánakvøldið hækkaði amerikanski tjóðbankin rentuna. Hetta var tann sjeynda hækkingin síðani seinasta summar, men vit kunnu vænta uppaftur fleiri.

Tað kom ikki óvart á nakran, at amerikanska rentan hækkaði nú, og hækkingin, sum Alan Greenspan kunngjørdi mánakvøldið, var sum væntað 0,25 prosentstig. Sostatt er amerikanska rentan nú 2,75 prosent ella umleið eitt prosentstig oman fyri meðalrentuna í Evropa.

Amerikanski tjóðbankin hevur boðað frá, at hann er til reiðar at hækka rentuna uppaftur meiri, um tað er neyðugt fyri at tálma inflasjónini. Bankin sigur, at sum er er ikki vandi fyri ov stórari inflasjón, men at trýstið er vaksið í seinastuni, og tí er tað væl hugsandi, at rentan hækkar aftur um stutta tíð.

## Tær fyrstu handtøkurnar

Myndugleikarnir í Sudan hava tikið 15 fólk, sum eru skuldsett fyri ágang ímóti sivilfólkinum í landspartinum Darfur.

Hetta er fyrstu ferð, at sudansku myndugleikarnir hava tikið fólk, tí tey hava verið uppi í ágangnum í Darfur. Sambært einum talsmanni hjá stjórnini eru tey 15 úr herinum, løgregluni og fregnartænastuni, og tey eru skuldsett fyri harðskap, neyðtøku, morð og eldásetting. Frakland hevur kravt, at tey, sum verða tikin í sambandi við ágangin í Darfur, skulu fyri altjóða krígsbrotsmannadómstólin í Haag, men tí hevur Sudan sýtt fyri higartil. Stjórnin har heldur uppá, at tað sudanska rættarverkið er ført fyri at taka sær av slíkum málum.

Ágangurin í Darfur byrjaði fyri tveimum árum síðani, men altjóða samfelagið hevur gjørt lítið fyri at steðga honum. ST hevur lagt sudansku stjórnina undir at stuðla vápnaðum bólkum, sum gera seg inn á sivilfólkið, og USA og onnur lond hava hótt Sudan við tiltøkum, heldur ágangurin ikki uppat.

## Einki oljuævintýr enn

Í seinastuni hava norðmenn bíðað í spenningi eftir, at felagið Hydro skuldi finna olju í Obelix-økinum í Barentshavinum, og útlit vóru eisini til, at fundið kundi gerast tað største í norska partinum av Barentshavinum. Serliga í Norðurnoregi bíðaðu fólk í spenningi, tí eitt oljufund hevði drigið nógv arbeiðspláss til økið.

Men í páskavikuni brustu allar vónir. Tá kunngjørdi oljumálaráðið í Oslo, at Hydro var komið fram á olju, men at talan er um so smáar nøgdir, at tað loysir seg ikki at gera meiri við tað. Tí er boriholið tett aftur.

Úrslitið hjá Hydro merkir kortini ikki, at tey norsku oljufeløgini hava mist allar vónir um at finna olju í Barentshavinum. Boripallurin "Eirik Raude", sum boraði leitiholið fyri Hydro, skal nú bora fyri Statoil, sum ætlar sær at bora tveir brunnar í Barentshavinum. Tann fyrri skal borast í Guocva-økinum og tann seinni í Uranus-økinum, skrivar Aftenposten.

## Kofi Annan í døpurhuga

Keldur á ST-høvuðsborgini í New York vilja vera við, at Kofi Annan, aðalskrivari, er í døpurhuga, og at hann umhugsar at leggja frá sær.

Orsøkin er ein frágreiðing, sum verður løgd fram seinni í vikuni. Har kemur millum annað fram, at tann 29 ára gamli Kojo Annan, sum er sonur aðalskrivaran, hevði ein rættiliga ivingasaman leiklut, tá ST loyvdi Irak at selja olju, so landið kundi keypa mat og heilivág. Kojo Annan arbeiddi tá hjá einari sveisiskari fyritøku, sum slapp at selja Irak vørur, og tað er komið fram, at fyritøkan rindaði Kojo Annan 2,5 milliónir krónur í ómakssløn.

Fleiri amerikanskir politikarar hava kravt, at Kofi Annan skal leggja frá sær orsakað av málinum um sonin. Teir vísa eisini á, at hetta er ikki tann fyrsta gølan, sum ST er komið í, meðan Annan hevur verið aðalskrivari. Eitt nú vísa teir á, at ST-hermenn hava neyðtikið børn í Kongo.

# Flýddu undan havinum



*Fólk gjørdust ræðsluligin, tá myndugleikarir ávaraðu um flóðaldu. Hendan myndin er úr Teilandi*

**Tann harði jarðskjálvtin undir havbotninum vestan fyri Sumatra mánadagin hevur helst kravt ímillum 1.000 og 2.000 mannalív**

JARÐSKJÁLVTI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fólk í Indonesia, Reilandi og Sri Lanka gjørdust ræðsluligin, tá tey sunnudagin frættu, at ein harður jarðskjálvti hevði verið undir havbotninum vestan fyri Sumatra. Skjálvtin, sum var 8,7 á Richter-stiganum, fekk fólk at minnast tað, sum hendi annan jóladag.

Amerikanska flóðalduávaringin í Kyrrahavinum ávaraði um, at skjálvtin kundi elva til eina flóðaldu. Tað fekk myndugleikarnar í Indonesia, Teilandi og Sri Lanka og kunngera flóðalduávaring, og fólk í túsundatali leitaðu sær burtur frá strondini. Í indonesiska landspartinum Bandar Aceh tóku fólk til rýmingar, og á gistingarhúsunum í Teilandi fingu tey útlendsku ferðafólkini boð um at fara út og at leita sær burtur frá havinum.

Men einar tveir tímar seinni bleiv flóðalduávaringin avlýst. Heilt snikkaleys sluppu londini ikki, tí á nøkrum indonesiskum oyggjum vistu fólk at siga, at har var ein tríggjar merar høg flóðalda komin inn á strondina.

Tann største skaðin stóðst kortini av tí harða skjálvtanum. Á indonesisku oynni Nias hildu myndugleikarnir í gjár, at har hevði skjálvtin kravt umleið 1.000 mannalív, og at nógv hús høvdu fingið stóran skaða. Myndugleikarnir í Jakarta søgdu í gjár, at talið á deyðum kundi koma upp í 2.000.

Miðdepilin í jarðskjálvtanum mánadagin var einar 30 kilometrar undir havbotninum vestan fyri Sumatra ella einar 20 kilomerar niðari enn miðdepilin í skjálvtanum annan jóladag. Tað var sambært jarðfrøðingum orsøkin til, at skjálvtin hesaferð ikki elvdi til eina flóðaldu.

# Harrans Mótstøðuherur ger aftur um seg

**Uppreistrarmenn hjá Harrans Mótstøðuheri í Uganda hava aftur gjørt seg inn á ósekar kvinnur**

UGANDA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Harrans Mótstøðuherur er aftur farin í hernað ímóti sivilfólkinum í Uganda. Herurin er kendur fyri sín óhugnaliga harðskap, og almennar keldur upplýstu í gjár, at menn hjá Harrans Mótstøðuheri høvdu lopið á eina bygd nærhendis sudanska markinum.

– Tá teir høvdu tikið bygdina, savnaðu teir kvinnurnar saman og bardu tær av. Í Kitgum tóku teir eisini fleiri kvinnur og skóru bróstini og varrarnar av summum teirra, segði guvernørurin í Gulu-landspartinum, Walter Ochora, við amerikonsku tíðindastovuna AP.

Tað er ikki greitt, hvussu nógvar kvinnur fingu hesa viðferðina. Eitt blað vil vera við, at tær vóru tvær ella tríggjar, og at tann yngsti álopsmaðurin var bara 16 ára gamal. Blaðið visti eisini at siga, at fleiri aðrar kvinnur vórðu burturfluttar.

Sambært ugandisku myndugleikunum hevur Harrans Mótstøðuherur skipað fyri fleiri tílíkum álopum í seinastuni. Myndugleikarnir halda, at ovastin hjá herinum, Vincent Otti, hevur fjalt seg í Sudan, men at hann er komin til Uganda nú, og at hann hevur einar 300 væl vápnaðar menn við sær. Teir seinastu fjúirtan dagarnar hava myndugleikarnir fingið boð um fleiri álop hjá herinum, og allastaðni er framferðin líka óhugnalig.

Harrans Mótstøðuherur hevur stríðst ímóti stjórnini hjá Yoweri Museveni, forseta síðani 1988. Endamálið hjá herinum er at koyra forsetan og stjórnina frá og at skipa Uganda eftir einari løggávu, ið skal hava Tey tíggju boðini sum grundarlag.